


[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 05 - 07 - 2013

# Olju-tungvektari í Hetlandi

Hetlendingar uppliva í hesum døgum nýggjar tíðir, eitt slag av endurføðing av oljuævintýrinum, sum byrjaði fyri umleið 40 árum síðani. Stórar útbyggingar av nýggjum oljukeldum og umfatandi leiting fyri hundraðtals milliardir kr. fara fram bæði vestan og eystan fyri oyggjarnar. Hetta er ein gongd, sum fer at tryggja Hetlandi oljuinntøkur og arbeiðspláss langt inn í framtíðina. Fyri okkum føroyingar, sum næsta grannaland og sum komandi ár fara undir aftur at bora leitibrunnar, er tað eisini forvitnisligt at fylgja gongdini eystan fyri markið. Og júst í hesum døgum kunnu tey í høvuðsstaðnum Lerwick við egnum eygum síggja, hvussu stórt virksemið veruliga er. Hesa vikuna hevur ein av tungvektarunum í altjóða oljuvinnuni - heimsins største krana-skip, sum er komið til oyggjarnar at gera tað grundleggjandi arbeiði í sambandi við útbygging av oljukeldum, ligið út fyri býin. Kranaskipið Thialf hevur tveir kranar, sum kunnu lyfta 14.200 tons og verður tí nógv brúkt í eitt nú oljuvinnuni. Uppgávan hjá hesum risanum av einum kombineraðum krana-skipi og undirsjóvarpalli er at lyfta teir upp til 22.000 tons tungu partarnar av teimum báðum pallunum, sum koma at mynda framtíðar oljuframleiðsluna á nýggju oljukelduni Clair Ridge, vestan fyri Hetland og skamt frá føroyska markinum. Hetta er næsta útbyggingin av risastóru Clairkelduni, sum varð funnin í 1977 og fer at kosta umleið 40 milliardir kr. Keldan er mett at goyma 650 mill. tunnur av olju. Keldan liggur eystan fyri Rosebank-fundið, sum varð umrøtt á Oljuportalinum í hesi vikuni. Báðar hesar útbyggingarnar koma at fáa stóran týdning fyri royndirnar hjá Bretlandi at varðveita og menna sína oljuframleiðslu. Myndirnar er av ristastóra kranaskipinum Thialf. Kelda Shetland Island News. Myndir vísa eisini pallarnar, sum verða settir á havbotnin í hesum døgum umframt eitt av heimsins størstu rørleggingarskipum, sum eisini hevur verið til arbeiðis í Hetlandi at leggja